# Fótbóltur er eitt undarligt spæl

**Væl trimmaðu gøtumenninir megnaðu ikki tað, sum superveteranar í vánaligari venjing hjá B71 megnaðu fyrr í summar**

SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin kom tað spenningur í aftur landskappingina. Munurin ímillum GÍ og B36 minkaði niður í trý stig, og nú kann tað gerast heilt spennandi, tá B36 fær vitjan av GÍ. Tann dysturin skuldi sambært skránni verið spældur í trettanda umfarinum, men nú er hann útsettur frá 19. august og til 12. september.

Um gongdin verður tann sama, sum hon kann roknast við at verða – tað vil siga, at bæði GÍ og B36 fara at vinna sínar dystir – so verður talan um sanna finalu mikukvøldið ímillum 15. og 16. umfarið.

B36 er trý stig aftanfyri GÍ, men tað ber væl til at ímynda sær árstalsfelagið sum meistaralið. Men so skal B36 vinna á heimavølli ímóti GÍ. Um tað stendur á jøvnum í stigum, so eru innanhýsis dystirnir avgerandi, áðrenn málmunurin verður tikin inn í myndina. Tá B36 í 4. umfarinum var í Gøtu, vann GÍ 3–1. GÍ javnleikurin á Eiði og B36 sigurin á Sandi høvdu við sær, at nú er tað B36, sum hevur betra málmunin. B36 hevur +31, og Gí hevur +29.

## Støðugt

Steypavinnararnir úr B36 vóru heilt sannførandi á Sandi, har heimaliðið ikki slapp at pynta um, fyrrenn B36 var komið framum 5–0. 20. mai var fjórða umfarið í landskappingini á skránni. Tá var B36 í Gøtu, har heimaliðið vann. Síðani tá hevur B36 spælt sjey dystir, og teir hava vunnið hvørja ferð.

Tá vit líta í skránna, mugu vit rokna B36 sum upplagdan favoritt í øllum dystunum, sum eru eftir at spæla – burtursæð frá toppdystinum ímóti GÍ, tá alt sær út til at vera púra opið.


Gøtumenn hava nógvar skaðar í løtuni, og aðrir, so sum Helgi L. Petersen, verða meira ella minni pjøssaðir saman til dystirnar
*Mynd: SJ*


B36 heldur framvegis fast um sigursgongdina, og hóast munurin er trý stig upp til GÍ, so munnu alt fleiri nú rokna árstalsfelagið sum favoritt í FM-stríðnum
*Mynd: Emil Simonsen*

Men Piotr og teir í B36 gera væl ímóti sær sjálvum, um teir bara hugsa um næstu uppgávuna. Tað kann fara at vísa seg, at hon verður ivaleysa torfør. Komandi leygardag – næstu ferð verða allir dystirnir spældir leygardag, tí landsliðið fer til Jugoslavia sunnudagin – koma fyrrverandi B36 toppskjúttin, Bergur Magnussen, og hansara menn í EB/Streymi í Gundadal. Teir hava fleiri ferðir í ár víst, at teir ikki eru kanónføði. Hetta kunnu teir í GÍ skriva undir uppá, eftir at teir sunnudagin ikki megnaðu meiri enn javnleik á Mølini.

## Undarligt

Úrslitið á Mølini síðsta sunnudag undirstrikaði enn eina ferð, at tað er fynd í tí, tá tað verður sagt, at bólturin er rundur, og at alt kann koma fyri í fótbólti.

Í síðsta umfarinum undan summarsteðginum var B71 á Eiði. Sandoyingarnir vóru illa fyri við fólki. Tað sást m. a. aftur í, at tað var neyðugt hjá teimum at brúka bæði Ib Mohr Olsen og Páll á Reynatúgvu, og ilt gjørdist uppaftur verri, tá miðvallarin Julian Floresco noyddist at taka seg av válinum, tí hann var skaddur.

Men hóast vánaligu fyritreytirnar, so megnaði B71 ta ferðina at vinna 2–1 á Mølini.

Sunnudagin var GÍ á Eiði. Tað kann væl vera, at gøtumenn fyrr í ár hava verið manningarliga betri fyri, enn teir vóru hesa ferð, men kortini var tað merkisvert, at teir ikki megnaðu tað sama, sum eitt haltandi B71 lið megnaði.

Ivaleyst eru nógvar frágreiðingar upp á, hví tað tørnaði soleiðis út, sum tað gjørdi á Mølini. Men tað er upplagt, at EB/Streymur trívst væl betri, tá teir eru kroystir, og tá teir harvið kunnu dúva upp á kontra, enn teir gera, tá tað verður roknað við, at teir skulu mynda spælið. Hetta er nakað, sum teir í B36 eiga at leggja sær í geyma, nú teir fyrireika seg til vitjanina úr Sundalagnum.

## Stríðið um Europa

Úrslitini hesa ferð gjørdu, at stríðið um síðsta atgongumerkið til Europa Cup gjørdist størri. GÍ og B36 eru sjálvsagt best fyri í tí stríðnum. Eitt triðja Europa Cup pláss er at kappast um. B68 er best fyri í tí stríðnum, men tað er so mikið tætt, at um B68 komandi sunnudag tapir á heimavølli ímóti NSÍ, sum er á sjeynda plássinum, so eru grannarnir javnir í stigum.

HB vil fegið vera við í Europa Cup á hvørjum ári, men vónirnar um altjóða luttøku kámaðust sunnudagin, tá hýrurin ikki var góður. HB tapti annan landskappingardystin upp í slag 2–1, og eins og tað var, tá HB undan summarsteðginum var á Toftum, so var avrikið ímóti KÍ lítið sannførandi.

Leygardagin skal HB norður til Gøtu. Tann uppgávan verður ikki løtt, nú GÍ ikki fekk fult á Eiði.

Umframt B68 og HB er VB við í kappingini um bronsumerkini. Úrslitini sunnudagin bóru við sær, at klaksvíkingar aftur eru við í tí kappingini. Eitt er, at teir vunnu sær trý kærkomin stig í Gundadali og harvið komu upp undir HB. Eitt annað er, at KÍ – uttan mun til endastøðuna í landskappingini – kann fáa triðja Europa Cup plássið. Tað gera teir, um B36 fer at liggja omaná GÍ í FM stríðnum. So fær KÍ sum tapari í steypafinaluni Europa Cup plássið, ið verður tómt, tí B36 skal luttaka í europeisku meistarakappingini.

Um tað skuldi lagað seg soleiðis, so verður virðið í triðja plássinum í landskappingini ikki meiri enn Intertoto Cup pláss.

## Botnstríðið

At NSÍ vann fyrsta landskappingardystin á nýggja graslíkisundirlagnum í Runavík hevði við sær, at gloppið frá teimum og niður til tey bæði aftastu plássini øktist so mikið, at NSÍ ikki er botnlið. Sum omanfyri nevnt so kunnu teir koma upp í stríðið um bronsuna, um teir megna at vinna á Svangaskarði komandi leygardag.

Hjá FS Vágum stendur ikki væl til.Vágamenn eru aftast. Komandi leygardag fáa teir vitjan av B71, og tá verður talan av álvara um lagnudyst. Um FS Vágar ikki fær trý stig ímóti sandoyingum, so verða teir heilt illa sperdir í botninum, og um teir tapa, so skal næstan eitt undur til hjá teimum fyri at sleppa undan beinleiðis niðurflytingini. Men tað varð aftur undirstrikað sunnudagin, at fótbóltur er eitt undarligt spæl. Tí er einki annað at gera enn at fylgja við, hvussu tað fer at tørna út í sjey teimum síðstu umførunum – bæði í toppinum og botninum.



NSÍ-FS Vágar 3-0 (1-0)

# NSÍ greiddi setningin


*Sjúrður Jacobsen hevði sentralan leiklut á NSÍ-miðvøllinum, og umframt at skjóta fyrsta málið, legði hann upp til nummar tvey hjá runavíkingunum*
*savnsmynd*

**Sum væntað vunnu runavíkingar á vágamonnum, og nú hevur NSÍ av álvara blandað seg upp í bólkin av liðum, sum eltir møguleikan fyri bronsumerkjunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Runavíkingar vóru snøgt sagt noyddir at vinna, tá vágamenn komu á vitjan sunnudagin.

Gongdin í fyrru kappingarhálvu var langt burtur frá tí, sum vónirnar í runavík vóru um, men hinvegin hava óstøðugu úrslitini hjá flestum av hinum liðunum í deildini syrgt fyri, at runavíkingar framhaldandi kunnu blanda seg í stríðið um bronsumerkini, nú gøtumenn og teir úr B36 tykjast vera einsamallir í kappingini um ávíkavist gull- og silvurmerkini.

## Dovislig byrjan

Fyrstu løtuna sá tó ikki út til, at runavíkingar ætlaðu sær at gera stórvegis við mótstøðumenninar. Spælið var heldur dovisligt, og hóast NSÍ kanska hevði eina lítla leikliga yvirvág, so spurdist ikki stórvegis av málmøguleikum burturúr.

Kanska vil onkur vera við, at tað mundi vera nýggi vøllurin í Runavíkini sum órógvaði somikið nógv. Í øllum førum er hesin nakað væl bleytari at renna á enn gamli vøllurin, sum kanska kundi samanberast við betongólv, so harður sum hann var vorðin við aldrinum.

Hol kom tó á eftir hálvan tíma, men málið var av tí meira tilvildarliga slagnum. Ein bóltur varð sendir innfyri, og eftir eitt sindur av trunkaspælið støkk bólturin út til Sjúrð Jacobsen, og hann gjørdi ikki mætari enn at senda bóltin í meskarnar.

## Ferð á í seinna

Hetta kom sjálvandi illa við hjá vágamonnum, og tað viðførdi eisini, at teir vórðu noyddir at søkja longur fram á vøllin í seinna umfarinum.

Hetta gav betri pláss hjá runavíkingunum at spæla á, og skjótt sást eisini, at tað tóktist meira sannlíkt, at teir fóru at økja um leiðsluna, heldur enn at gestirnir skuldu javna.

Spælið gjørdist nógv meira málsøki. Borðini vórðu nýtt til tess at sleppa inn um verjuna, og hetta kastaði so við og við eisini fleiri málmøguleikar av sær.

Tað tók heldur ikki runavíkingum meira enn knappar 10 minuttir av seinna hálvleiki. So høvdu teir økt um leiðsluna við einum frálíkum máli. Djóni N. Joensen sendi ein djúpan bólt inn um verjuna í høgra borði, har Sjúrður Jacobsen slapp sær avstað. Komin oman móti brotsteiginum sendi hann inn til Ian Højgaard, sum ikki hevði stórvegis trupulleikar av at senda í kassan, og so var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Runavíkingar kundu helst eisini fingið nógv fleiri mál, og teir høvdu í øllum førum møguleikarnar til tess, men tað gjørdist tó bert hitt eina afturat. Hetta skeyt Sonni L. Petersen miðskeiðis í hálvleikinum, og uppskriftinvar meinlík henni, sum 2-0 málið varð skotið eftir.

Hesu ferð var tað í vinstru, at uppspælið stavaði. Eddie Mikkelsen varð sendir avstað, og so var Sonni fyrstur á, tá bólturin varð sleptur inn.

## Hava bronsuna í eygsjón

Sum sagt, so kundu runavíkingar væl vunnið dystin við nógv meira sannførandi tølum, og ivaleyst munnu teir eisini iðra seg um onkran av misnýttu møguleikunum.

Hinvegin skerst ikki burtur, at tað var harðligani tiltrongt, at dysturin endaði við einum sigri fyri teirra viðkomandi. Undan kappingarárinum varð sagt, at nú skuldi spælið hjá liðnum gerast meira stabilt. Hetta er tó akkurát tað, sum ikki er hent. Úrslitini hava til tíðir verið frálík, og eisini spælið hevur verið heilt gott onkuntíð. Millum annað tá HB var á vitjan í vár. Ta ferðina var liðið tó fyri sannari eyðmýking bert eina viku seinni, tá talan varð um stórtap í Vági, so enn er í øllum førum langt á mál viðvíkjandi stabilitetinum.

Tá sæð verður burtur frá teimum báðum fremstu, so hevur stabilitetur so avgjørt ikki eyðkent avrikini hjá hinum liðunum í deildini, og tí hevur NSÍ framvegis møguleikan at røkka heiðursmerkjum.

Í løtuni eru tað grannarnir av Toftum, sum sita á bronsusessinum, men runavíkingar hava sjálvir møguleikan at tosa við um hetta. Komandi vikuskifti skulu teir nevnliga inn á Toftir at vitja, og mangt bendir á, at hetta kann gerast ein grannauppgerð av teimum heilt spennandi.

## Botnuppgerðirnar bíða

Vágamenn hava tó eisini týdningarmiklar dystir fyri framman í sín part. Komandi bæði vikuskiftini skulu teir royna seg móti ávíkavist B71 og EB/Streymi, og hetta eru uttan iva dystir, sum fara at hava avgerandi týdning fyri lagnuna hjá vágaliðnum í bestu deildini. Kravið er her í minsta lagi trý stig, og allar helst skulu vágamenn fáa meira enn tað, fyri at lívbjarga sær, men um tað fer at eydnast, er so ein onnur søga.

## Dysturin í tølum:

**NSÍ-FS Vágar 3-0 (1-0)**
1-0: Sjúrður Jacobsen 30
2-0: Ian Højgaard 54
3-0: Sonni L. Petersen 69
**Dómari:** Niklas á Líðarenda (GÍ)

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Rúni Rasmussen, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard, Jónstein Petersen – Gert Langgaard, Sjúrður Jacobsen, Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen – Ken Nónklett, Dánjal Hansen

FSV: Arturast Ramoska – Jógvan H. Samuelsen, Vlad Osipov, Jákup Joensen, Ruslan Screlea – Per Joensen, Hannus Olsen, Sonni Johansen, Jón Nielsen, Jack Johansen – Birgir Joensen, Sonni Johansen


